# Eftirlit við føroyingum á stovni í Danmark

**Heimarøkting og Serforsorgin hava gjørt avtalu við Ásu Egholm, cand. pæd.psyk, um at hava eftirlit við føroyingum, sum eru á stovni í Danmark**

SERFORSORG
*Eirikur Lindenskov*

Heimarøktin og Serforsorgin hava gjørt avtalu við Ásu Egholm, Cand. Pæd. Psyk, um vegna føroysku myndugleikarnar at hava eftirlit við føroyingum, sum eru á stovni í Danmark.

Talan er um 25 vaksnar føroyingar við serligum tørvi, sum búgva á stovni í Danmark. Hetta eru fólk í aldrinum 30-75 ár, og tey flestu hava búð meginpartin av lívinum í Danmark.

Ása Egholm skal hava eftirlit við heesum virkseminum í Danmark, og snýr avtalan um snýr seg um eftirlit við tilboðunum, sum hesir brúkarar við serligum tørvi fáa í Danmark. Eisini fevnir avtalan um eftirlit við teimum útreiðslum, landskassin hevur í hesum sambandi.

Tað hevur leingi verið ynski um at fáa meira gjøgnumskygni í samstarvinum við donsku myndugleikarnar á hesum øki, men trupult hevur verið at funnið rætta serfrøðingin til uppgávuna, sigur Mary J. í Garði, stjóri á Heimarøktini og Serforsorgini.

Heimarøktin og Serforsorgin er tí sera fegin um at hava fingið hesa avtaluna í lag. Ása Egholm er serfrøðingur innan serstovnaøkið. Hon er føroysk og starvast innan danska almannaøkið.

Uttan iva kemur avtalan at verða til gagns bæði fyri føroysku brúkararnar í Danmark og føroysku myndugleikararnar, sigur Mary J. í Garði.

# Føroya Banki 50 ár í Klaksvík

**Deildin hjá Føroya Banka í Klaksvík kann í dag hátíðarhalda sín 50 ára stovningardag. Í hesum sambandið er móttøka frá kl: 15 - 18**

FØÐINGARDAGUR
*Barbara Tausen*
*Lena R. Guttesen*



*Norðoya Banki helt til í hesum bygninginum í Klaksvík*

Í dag 15. november er ein merkisdagur í Klaksvík.

Føroya Banki í Klaksvík heldur í dag 50 ára stovningardag. Hendan dagin lat umframt Føroya banki eisini Sjóvinnubankin upp í Klaksvík undir navninum Norðoya Banki. Fyrsti stjórin í Føroya Banka var Pauli Gaard Hansen.

Norðlýsið skrivar í 1955: „Sum kunnugt bygdi Sjóvinnubankin beint eftir kríggið stór bankahús í Klaksvík, men áðrenn tey vóru liðug kom krakkið og harvið steðgurin í her norðuri.

Tað hevur leingi verið tørvur á at havt banka í hesi stóru vinnubygdini, og er tað ein góður lætti, og eitt framstig fyri vinnulívsmenn í bygdini, at teir hava bankar við hondina og sleppa undan at fara til Havnar, hvørja ferð tað er neyðugt at samráðast við bankarnar".

Í næstan 40 vóru tveir bankar í Klaksvík, til Føroya Banki og Sjóvinnubankin løgdu saman í 1993.

Í dag ber bankin í Klaksvík navnið Føroya Banki, og er Hans Peter Clementsen stjóri í bankanum.


*.Avgreiðtslan hjá Norðoya Banka í Klaksvík, Maðurin, ið situr við kassan, er Ísak Mikladal. Myndin er tikin einaferð í 80-inum*

## Reint drekkivatn til árnfirðingar


*Drekkivatnið í Árnafirði er reint, staðfesta kanningar hjá Klaksvíkar kommunu*

**Árnafjørður:** Nýggja vatnreinsiverkið í Árnafirði hevur nú koyrt í næstan tveir mánaðir, og royndirnar vísa, at drekkivatnsgóðskan er í lagi, skrivar heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu.

Kanningarnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni vísa, at bæði tey kemisku og tey mikrobiologisku úrslitini lúka krøvini, sum sett eru fyri drekkivatn. Út frá hesum kunnu tí allir íbúgvar og virkir í Árnafirði brúka drekkivatnið beinleiðis úr krananum.

Fyri at eftirkanna og tryggja framhaldandi nóg góða vatngóðsku, ætlar Klaksvíkar Kommuna framyvir at gera reglu-ligar kanningar av drekkivatninum.

**sb.**

## Breitt samstarv um barnavernd


*Sunda kommuna hevur nú fingið tríggjar kommunur aftrat sær til barnaverndarsamstarvið*

**Sundalagið:** Sunda Kommuna hevur nú gjørt avtalu við tríggjar kommunur í Norðoyggjum um barnaverndarøkið.

Frammanundan eru Sunda og Eiðis Kommuna gingnar saman um barnaverndarøkið, og við trimum kommunum í Norðoyggjum verður talan um eitt øki við íalt 3500 íbúgvum.

Viðareiðis, Hvannasunds og Húsa Kommuna hava nevniliga allar søkt um at gerast partur av barnaverndarøkinum, ið Sunda og Eiðis Kommuna eru gingnar saman um, og longu hava gjørt avtalu um.

Umsóknin frá teimum trimum kommununum var til viðgerðar á bygdaráðsfundum í Sunda og Eiðis Kommunu í gjárkvøldið, og varð uppskotið einmælt samtykt í Sunda kommunu.

**sb.**

## Árskalendari fyri missiónsarbeiði

**Kalendari:** Aftur í ár hevur Kirkjuliga Missiónsfelagið givið út árskalendara sín.

Umframt teir vanligu upplýsingarnar um m.a. dagin, mánaðin og mánan er eisini prædikutekstirnir til teir ávísu sunnudagarnar og halgidagarnar. Eitt skriftstað til hvønn gerandisdag í árinum er eisini á kalendarinum.

Avlopið av søluni fer til arbeiðið hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum. Tað er Egil Joensen í Klaksvík sum hevur lagt kalendaran til rættis.

**sb.**